FISKI – og TILFEINGISMÁLARÁÐIÐ

**ALTJÓÐAHVALAVEIÐUNEVNDIN (IWC) 2008**

**Fiskivinnustovan**
Tórshavn, tann 10. juni 2008
Mál.: 200800032 / 230
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: KASA

## Danska heimildin til IWC/60 í Kili

- Tann 60. ársfundurin hjá IWC verður hildin í Santiago, Kili í døgunum 23-27- juni 2008. Sendileiðarin fyri Danmark er Ole Samsing, danska uttanríkismálaráðið (UM/DK). Einki umboð úr Føroyum verður við í donsku sendinevndini í ár.

- Í 2007 luttók Kaj P. Mortensen (Løgmansskrivstovan) fyri Føroyar í donsku sendinevndini til IWC ársfundin (Anchorage, Alaska). Føroyar vóru ikki umboðaðar á ársfundunum í 2006 (St Kitts & Nevis) ella 2005 (Korea).

- Føroyar hava tó í longri tíð havt ein virknan leiklut í IWC samskipandi bólkinum, sum UM/DK stendur fyri, har arbeitt verður saman hvørt ár at viðgera og finna semju um støðuna til málini, sum eru á dagsskránni til ársfundin.

- Sum heild lýsir Danmark (UM) seg sjálvt bæði í IWC og ES hópi sum "nationen i midten" í IWC, tí atlit skulu verða tikin til áhugamálini hjá Grønlandi (stórhvalakvotur til "upprunafólk") og Føroyum (at IWC ikki skal umsita smáhvalaveiðu eins og grind).

- Tann 5. juni samtykti ES ráðið (umhvørvið) eina felags ES støðu til ársins IWC fundin, sum m.a. hevur við sær, at ES londini skulu í felag arbeiða fyri at varðveita hvalaveiðubannið frá 1982. Danmark hevur ikki tikið undir við felags ES støðu og hevur í hesum sambandi formliga víst á Maastricht yvirlýsingina 25[1]. Høvuðsorsøkin er atlit at grønlendskum og føroyskum sjónarmiðum. Yvirhøvur kann eisini sigast, at danska uttanríkismálaráðið hevur - til fánýtis - roynt at fingið undirtøku innan ES fyri eina smidligari støðu, sum viðurkennir, at IWC eigur aftur at virka eftir egnum sáttmála sum umsitingarstovnur fyri stórhvalir við m.a. at áseta kvotur fyri burðardygga vinnuliga stórhvalaveiðu.

- Danska stjórnin er aftur í ár eins og undanfarnu árini komin undir politiskt trýst frá andstøðuni í Fólkatinginum vegna sína "positivu" støðu fyri vinnuliga hvalaveiðu innan

[1] **Statement by Denmark On The Council decision establishing the position to be adopted on behalf of the European Communityat the 60th meeting of the IWC in 2008 with regard to proposals for amendments to the Schedule of the International Convention on the Regulation of Whaling.**
Denmark has consistently during the discussion of the proposal tried to bridge the gap between the divergent views within the Community on the proper policy to be pursued in the IWC, but it has proven impossible to reach a solution which safeguards the interests of Greenland and the Faroe Islands – Danish overseas territories not being a part of the European Community. In order to continue the whaling policy in the IWC, which Denmark has pursued for decades in the interest of its overseas territories, Denmark will act in accordance with Declaration no. 25 annexed to the Final Act of the Maastricht Treaty.

Ministry of Fisheries and Natural Resources
Heykavegur 6A • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

IWC. Tað nýggja í kjakinum í ár er, at nú hava ES lond samtykt fyri fyrst ferð eina felags støðu til IWC ársfundin, uttan undirtøku frá Danmark. Hervið er danska "serstøðan" komin í eitt enn skarpari ljós í politiska umhvørvinum í Keypmannahavn.

- Formaðurin í Fólkatings "Miljø- og planlægningsudvalg", Steen Gade (SF) hevur biðið um samráð við Per Stig Møller um donsku støðutakanina í IWC. Nevndin hevur fund mikudagin 11. juni.

- Danska uttanríkismálaráðið (v/ Ole Samsing) upplýsti undirritaðu í telefon og telduposti seinnapartin 10. juni, at tað sær í løtuni út til, at stjórnin ikki hevur ein meiriluta við sær í Fólkatinginum. Serliga verður víst til uppskotið um eitt friðingarøki fyri hvalir í Suðuratlantshavinum:

  "Det ser nu ud – på pressemeddelelser eller ved direkte personsamtaler – at der er et flertal imod ministeren på dette punkt, nemlig at partier, som repræsenterer et flertal i Folketinget (Socialdemokratier, SF, Radikale Venstre samt Dansk Folkeparti )vil forlange at Danmark stemmer for et hvalreservat. Dette krav vil blive fremsat i morgen på mødet i Folketingets Miljø- og Planlægningsudvalg. (t-postur frá Ole Samsing, kl. 1515, 10. juni 2008)

- Líknandi uppskot - eisini fyri Suðurkyrrahavið - hava fyrr verið løgd fram til støðutakan á IWC fundum undanfarnu árini, uttan tilmæli ella undirtøku frá IWC vísindanevndini og mest sum politisk tiltøk hjá avvarðandi limalondum (Brasilia/Argentina; Australia/Ný Sæland). Danmark hevur hildið seg til fylgjandi støðu viðvíkjandi slíkum uppskotum, sum semja hevur verið um millum ríkispartarnar í fleiri ár:

  "At Danmark vil kunne støtte etablering af sanctuaries såfremt:

  - Sådanne understøtter IWC-konventionens formål (at bevare og forvalte hvaler)
  - Er baseret på et videnskabeligt grundlag samt
  - Endvidere i det pågældende område forudsætter fravær eller regulering af anden menneskelig aktivitet, der vil kunne påvirke hvalerne og/eller deres habitater negativt.
  - Danmarks støtte forudsætter desuden samtykke fra de pågældende kyststater, således at et sanctuary kun bør omfatte områder indenfor disses fiskeriterritorium, hvis den pågældende kyststat er enig.

  - Dagsordenens pkt.**7** : Fredninger på den sydlige halvkugle m.v..

  På IWC's årsmøde i 1994 tilsluttede Danmark sig forslaget om at etablere et stort fredningsområde på den sydlige halvkugle, **dog uden tilslutning fra Færøerne.** Den danske tilslutning var begrundet i det antarktiske områdes særlige og sårbare karakter. Det blev fra dansk side tilkendegivet ved afstemningen, at Danmark ikke dermed tager afstand fra princippet om bæredygtig udnyttelse af hvaler samt, at den danske ja-stemme ikke præjudicerer en dansk stillingtagen til mulige kommende forslag om yderligere fredningsområder.

  Vedrørende forslag om nye fredningsområder (senest sydlige Atlanterhav samt sydlige Stillehav) indstilles, at Danmark som tidligere henholder sig til de indledningsvis på side 2 i instruksen anførte kriterier samt til de kriterier, som blev vedtaget ved konsensus i arbejdsgruppen herom under Norges ledelse på årsmødet i London i 2001. Det bemærkes, at Danmark ved alle tidligere afstemninger om førnævnte to fredningsforslag har stemt nej.

- Tá ið Danmark atkvøddi fyri hvalafriðingarøkinum í Suðuríshavinum í 1994, vóru Føroyar als ikki hoyrdar um málið. Støðan varð tikin í beinleiðis samráð millum táverandi danska umhvørvismálaráðharran, Svend Auken og táverandi landstingsformannin í Grønlandi, Lars Emil Johansen. Politiska avtalan var, at Grønland skuldi fáa eina hægri IWC kvotu av

sildrekum, men tá ið samanum kom, fekk Grønland einki eyka burturúr. Støðan hjá Hjemmestyre í Grønland er síðan broytt og í dag ætlar Grønland ikki longur at "selja prinsipp fyri kvotur".

- Føroyar hava øll árini hildið fast um sína støðu móti friðingarøkjum fyri hvalir, sum einki vísindaligt ella umsitingarligt grundarlag hava, eins og friðingarøkið í Suðuríshavinum. Mótstøðan móti slíkum friðingum hongur eisini saman við, at alheims bannið ímóti vinnuligari stórhvalaveiðu, sum samtykt varð í 1982 og sum skuldi endurskoðast í seinasta lagi í 1990, enn er í gildi. Í dag eru allir stórhvalir longu friðaðir, burtursæð frá teimum hvalum, sum sokallað "upprunafólk" fáa IWC kvotur fyri (t.d Grønland, USA/Alaska, Russland), sum limalondini í IWC kunnu brúka síni rættindi til at veiða í granskingarhøpi (Japan), ella har londini hava tikið fyrivarni fyri hvalaveiðubanninum og sett sær egnu kvotu (Noreg og Ísland).

**Ymiskt um søguligu gongdina í IWC**

- Í ár eru 26 ár liðin síðan IWC samtykti (í 1982) eitt fyribils bann fyri vinnuligari hvalaveiði, sum kom í gildi í 1985/86. Ætlanin var, at hvalaveiðibannið skuldi endurskoðast í seinasta lagi 1990, við atlit at stovnsmetingum og einari nýggjari kvotuskipan, soleiðis at kvotur aftur kunna setast til tess at tryggja eina burðardygga gagnnýtslu av stórhvalastovnum.
- Í 1992 var IWC vísindinevndin liðug við sínum arbeiði at gera eina nýggja kvotuskipan fyri stórhvalaveiði, tann sokallaða RMP (*Revised Management Procedure*). RMP má sigast at vera ein av heimsins tryggastu skipanum fyri umsiting av villini djórum, har ið jú størri óvissan er um stovnsmetingar, jú lægri verða kvoturnar. Tó er RMP skipanin enn ikki tikin í brúk í IWC, hóast hvalateljingar og aðrar umfevnandi kanningar hava síðan víst, at fleiri hvalastovnar, m.a. flestu sildrekastovnar, eru væl fyri og tola eina ávísa gagnnýtlsu.
- Avgerðin um at avtaka alheims hvalaveiðibannið og seta í verk RMP kvotuskipanina hevur verið útsett, meðan limalondini arbeiddu í meira enn 10 ár við at royna at finna semju um eina eftirlitsskipan fyri stórhvalaveiði – tann sokallaða RMS (*Revised Management Scheme*). Umframt RMP, skal RMS eisini áseta neyvar reglur fyri eina altjóða eftirlitsskipan, m.a. við IWC eygleiðarum umborð á hvalabátum. Fleiri og størri krøv hava verið sett síðani 1994 um, hvørjar reglur ein endalig RMS eigur at áseta.
- Ósemjan millum IWC limalondini um eina fullfíggjaða eftirlitsskipan er enn óloyst. Eftir fleiri eykafundir frá 2002 til 2004, eru tingingarnar um hesi viðurskifti at kalla lagdar á hyllina. Í staðin hevur núverandi formaðurin í IWC nevndini (USA) sett sjøtul á eina nýggja tilgongd at viðgera "framtíðina hjá IWC". Einki er komið burturúr hesari tilgongd higartil. Ein serfundur varð hildin í februar í ár, við framløgum hjá fleiri navnframum altjóða løgfrøðingum, men uttan nakað ítøkligt uppskot um, hvussu naggatódnin kann fáast úr aftur í IWC.
- Trupulleikin er í stuttum tann, at nøkur limalond í IWC hava sagt seg ongantíð vera til reiðar at góðkenna kvotur fyri vinnuligari stórhvalaveiði aftur, hóast hetta er endamálið hjá IWC. Uppaftur fleiri lond vilja seta so mikið strong krøv til eftirlitið fyri framtíðar vinnuligari stórhvalaveiði, at hon valla hevði loyst seg búskaparliga undir slíkum treytum. IWC reglur krevja, at tríggir fjórðingar av limalondunum mynda ein meiriluta fyri at taka umsitingarligar avgerðir, og ein slíkur meiriluti sýnist framvegis ikki at vera til staðar millum tey nú 80 limalondini.[2]

---

[2] Limatalið er hækkað frá 61 londum í 2005. Av hesum 80 limalondum í dag eru 17, sum ikki hava goldið limagjaldið og tískil ikki hava atkvøðurætt á IWC/60

**Støða Føroyar**

- Støða Føroya er tann, at IWC onga heimild hevur at umsita veiði av smáhvalum, sum grindaveiði í Føroyum. Hetta hevur ikki minst samband við, at Føroyar samstarva millumtjóða um smáhval gjøgnum limaskap í NAMMCO og hava ynskt at styrkt støðu NAMMCO sum samstarvsfelagsskapin á økinum.

- Støða Føroya hevur leingi verið tann, at økisbundna samstarvið í NAMMCO er í fullum samsvari við ásetingum í havrættarsáttmálum um, at lond skulu samstarva um vernd, umsiting og gransking av hvalum gjøgnum hóskandi millumlanda felagsskapir. Føroyar eru stovnandi limur í NAMMCO saman við Noregi, Íslandi og Grønlandi.
- Í fleiri ár hevur almenna kjakið ímóti hvalaveiðu verið bygt á tí grundarlagi, at hvalaveiði er "ólóglig" sambært IWC, og at tað ikki ber til at tryggja eina burðardygga gagnnýtslu av stórhvalum. Um so er, at IWC aftur fer at virka sambært egna sáttmála, kann hetta samstundis vera við til at fáa í rættlag aftur eina fatan av hvalaveiði sum vanlig vinnugrein, ið til ber at samstarva um. Hetta hevði havt stóran týdning fyri øll hvalaveiðilond, eisini fyri Føroyar, uttan mun til um Føroyar taka stórhvalaveiði uppaftur í framtíðini ella ikki.

Kate Sanderson, 10.06.08